## Við ella uttan tónleik

Tað finnast fleiri kirkjur í Føroyum har eingin urga finst. Her savnast fólk eins væl til gudstænastur og aðrastaðni, tí tey vilja koma saman við øðrum fyri at lurta eftir Guds orði og saman við hinum lovsyngja Gudi fyri tað hann er, og fyri tað, hann hevur gjørt fyri okkum.

Tað kann vera, at sálmasangurin gongur betri og lættari við urgu. Men tað ber eisini til at syngja uttan fylgispæl av nøkrum slagi.

Eitt dømi um hetta er á Toftum, har tey seinasta heyst skipaðu fyri stórum tiltaki, í samband við tann stóra dagin hjá tónasmiðinum Hans Jacob Højgaard. Hetta tiltakið umfataði eisini sang frá einum barnakóri, sum hesin tónasmiðurin í síni tíð skrivaði fleiri løg fyri. Til tiltakið vórðu savnaðar ungar gentur saman at syngja hesar vælkendu barnasangirnar, ið eru skrivaðir til tríggjar røddir uttan fylgispæl. Spurningurin hjá kórleiðaranum var: Tíma hesar ungur genturnar at syngja hesar sangirnar, uttan nakran tónleik afturvið?!

Og tað tímdu tær sera væl. Kórleiðarin gjørdist nevniliga bilsin av gentunum, tí sum tær søgdu: "Uttan ljóðføri hoyra vit so væl hvørja aðra. Og tá er tað eisini stuttligari at syngja".

## Sanggleðin má stimbrast heilt úr 1. flokki

Ein royndur urguleikari og tónasmiður var eisini við á fundinum.

Hansara sannføring var, at skal ein fáa líkinda sangarar í dag, so er neyðugt at skúlin longu í 1. flokki byrjar við góðari undirvísing í sangi. Byrjar ein fyrst, tá næmingarnir eru komnir í 6. flokk, er tað næstan ovseint.

Hann hevði roynt hetta við sangundirvísingini longu í 1. flokki í einum føroyskum skúla, og kundi staðfesta, at tað hevði givið úrslit.

– Tað var møtimikið, og tað tók sína tíð, men tað var stríðið vert, segði hann.

# Urgan er stór men

**Nógvar kirkjur hava tey seinnu árini útvegað sær stórar og vælljómandi urgur. Men kirkjuráðini hava mangastaðni ikki í sama mun hugsað um hvør skal leika á urguna**

KIRKJUURGAN
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Hvønn halgidag leitar kirkjufólkið sær í tær føroysku kirkjurnar. Har verða tey fyrst møtt við klokkuringing, áðrenn urguleikarin fer til verka við sínum præludium, soleiðis sum hann altíð hevur gjørt.

Soleiðis er støðan mangastaðni, men á einstøkum plássum í Føroyum stendur ikki so væl til. Urgan er har, men eingin er leika uppá hana, av teirri einfaldu orsøk at urguleikari er ikki til.

Henda støðan er ikki ókend fyri felagið fyri føroyskar urguleikarar, og tí hevur felagið valt at gera nakað ítøkiligt við hesa álvarsomu støðuna. Tí skipaði felagið fyri fundi leygardagin at tosa um hesi viðurskiftini, saman við urguleikarum og øðrum áhugaðum.

Mong evni vórðu tikin fram á hesum fundinum, hvørs endamál var at lýsa støðuna í teimum ymisku kirkjunum, og síðani stinga út í kortið, hvat gerast kann fyri at bøta um hesa støðuna í framtíðini.

– Tað er lítil nytta í at hava eina stóra og vakra urgu í eini kirkju, um eingin er at spæla uppá hana, sum tikið varð til.

Arbeitt hevur verið við at skipað eina tónleikalinju fyri kirkjutónleik undir Musikkskúlan, her ein hevði møguleika at læra ungfólk upp til komandi urguleikarar. Greitt er, at mong av teimum eldru halda bert á sum urguleikarar, tí eingin annar er at taka yvir. Spurningurin er, hvussu leingi tað ber til at halda fram við eini slíkari loysn.

Á fundinum í Fríðrikskirkjuni á Toftum vóru 25 fólk savnaði at tosa um hetta viðkomandi evnið. Semja var um, at hetta hevði verið ein góður og gevandi fundur. So er bert eftir at vóna, at nøkur av málunum, ið umrødd vórðu, kunnu gerast til veruleika.

### Hvør skal spæla?

Hesi seinastu árini hava nógvar av kirkjunum útvegað sær stórar, og harvið eisini kostnaðarmiklar urgur. Ein sigur, at urgan kostar so og so nógv, alt eftir hvussu nógvar røddir hon hevur. Hevur hon t.d. 30 røddir, kann urgan lættliga koma at kostar einar 3 mió. kr.

Eingin ivi er um, at allar hesar urgurnar eru eitt satt prýði inni í kirkjuni og geva sálmasanginum eina eyka dimensjón, tá væl verður spælt undir til sálmasangin. Men trupulleikin er mangan, at ov fá eru sum halda seg framat, tá spælast skal.

Í mongum av smærru kirkjunum eru tey í teirri støðuni, at trupult er at fáa urguleikarar til tær vanligu tænasturnar, hóast kirkjan



# 80 ár og spælir enn urgu

**Ikki er eins lætt hjá øllum kirkjum at manna urgurnar. Nógvir urguleikarar halda tí fram í tænastuni, hóast aldurin er høgur**

KIRKJUURGAN
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Tann stóra undirtøkan til fundin á Toftum vísti til fulnar, at tørvurin á urguleikarum í Føroyum er eitt mál, sum hevur áhuga bæði á Sandoynni, Suðuroynni, Havnini, Eysturoynni, Norðoyggjum, Vágum og aðrastaðni við.



*Urguleikarar úr øllum landinum vóru á fundinum - her síggjast Súni Kristiansen av Skála og Knút Olsen úr Havn*

Í nógvum kirkjum, serliga teimum stóru, stendur væl til við urguleikarum.

Við nógvar av størru kirkjunum eru ofta upp í trý fólk, sum kunnu skiftast um at røkja hesa tænastuna - t.d. við Fríkrikskirkjuna á Toftum.

Aðrastaðni er munandi truplari. Í onkrari kirkju er bert ein einstakur urguleikari, sum í allari eyðmýkd hevur spælt so trúfast í mong ár, - og sum fer at spæla, so leingi viðkomandi orkar og heldur seg til. Orsøkin er hin einfalda, at eingin er taka yvir ella at skifta við.

Her er ofta talan um kvinnur og menn, sum eru komin væl upp í árini, men sum vilja halda fram í hesi tænastuni, nettupp tí at hetta er ein tænasta fyri kirkjunnar Harra og kirkjuna, sum tey eru góð við og vilja offra seg fyri, uttan at fáa løn ella samsýning aftur fyri.

Dømi er um eina kirkju í eini lílari føroyskari bygd, har ein einasti urguleikari situr og ger tað sum hann kann, hóast aldurin ikki júst talar fyri at hesin átti at havt hug ella orku at spælt longur, tá ein altso er farin væl upp um tey 80 árini! Eingin avloysari tykist vera, og spælir hesin tí við sama lag, halgidag eftir halgidag.

Onkur vil kanska halda, at tey sita rimmaføst á urgubeinkinum og vilja ikki loyva øðrum urguleikarum at sleppa framat. Hetta er kortini ikki rætt, tí sum ein luttakari á fundinum segði tað so rámandi: "Eg flyti meg í somu løtu, sum onkur annar vil taka við eftir meg!"